Løgfrøðingur til Almannamálaráðið

Almannamálaráðið søkir eftir løgfrøðingi til avbjóðandi og spennandi starv, har uppgávurnar krevja fakligan førleika og áhuga fyri økinum, sum ráðið varðar av.

Fyri fulltrúa í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir fulltrúa í tíðaravmarkað starv frá 1. november 2021 til 1. november 2022 ella sambært nærri avtalu.

Starvið
Tú kemur at arbeiða við einum fjølbroyttum úrvali av ráðgevandi og fyrisitingarligum uppgávum á teimum økjum, ið ráðið umsitur við serligum denti á persóns-, familju- og arvarætt. Starvið er skipað á deildini fyri almanna- og familjumál.

Høvuðsuppgávurnar eru:

- At tilevna lógaruppskot og uppskot til kunngerðir og rundskriv
- At ráðgeva landsstýrisfólkinum
- At ráðgeva og leiðbeina stjórnarráðum, stovnum og felagsskapum
- At svara fyrispurningum úr t.d. Løgtinginum
- At umboða stjórnarráðið í ymsum høpi, herundir í sambandi við eftirlit og kunning um málsøki
- Málsviðgerð

Førleikar
Tú hevur útbúgving á kandidatstigi innan løgfrøði.

Tú ert nærløgd/nærlagdur og tænastusinnað/-ur og hevur góðar samskiftisførleikar, bæði munnliga og skrivliga, dugir at arbeiða sjálvstøðugt, men eisini at samstarva við onnur.

Tú megnar at arbeiða undir trýsti og at hava fleiri bóltar í luftini í senn, eins og tú dugir at arbeiða undir teimum treytum, ið eru galdandi í eini politiskari fyrisiting.

Lønar- og setanartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið.

Umsókn
Umsókn við avriti av prógvum o.ø skulu sendast talgilt til Almannamálaráðið á amr@amr.fo.

Umsóknarfreist
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 22. oktober 2021, kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Marjuna T. Magnussen, deildarstjóra, á tlf. 734060 ella umvegis teldupost á marjun.magnussen@amr.fo.

Almannamálaráðið umsitur almannamál, bústaðarmál, javnstøðumál og persónsfamilju og arvarætt og veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika.

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn

Tlf: +298 30 40 00,
e-mail: amr@amr.fo

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Social Affairs